# Hvørja støðu hava føroyingar til javnstøðu millum kvinnur og menn í Føroyum

Karin Jóhanna L. Knudsen, samfelagsfrøðingur,
Granskingardepilin fyri Samfelagsmenning, Fróðskaparsetur Føroya

# Innihaldsyvirlit

Inngangur og endamál ........ 2

Dátugrundarlag ........ 3

Dátuinnsavning ........ 3
Fylgibólkur ........ 3
Gerð av spurnablaði ........ 4
Umboðan í kanningini ........ 4

Hvørja støðu hava kvinnur og menn til javnstøðu ........ 7

Verður tosað um javnstøðu ........ 7
Hvørjar meta kvinnur og menn vera teir størstu javnstøðutrupulleikarnar ........ 9
Skulu myndugleikar lóggeva um javnstøðu ........ 11
Skulu myndugleikar, arbeiðspláss og skúlar seta tiltøk í verk ........ 12

Hvørja støðu hava fólk við ymiskari útbúgving til javnstøðu ........ 13

Verður tosað um javnstøðu ........ 13
Hvørjir meta ymiskir bólkar vera størstu javnstøðutrupulleikarnar ........ 16
Skulu myndugleikar lóggeva um javnstøðu ........ 19
Skulu myndugleikar, arbeiðspláss og skúlar seta tiltøk í verk ........ 20

Orðið er frítt ........ 21

Vantandi páparættindi ........ 22
Javnstøða er eingin trupulleiki ........ 23
Um at lóggeva um javnstøðu ........ 24

Samandráttur ........ 25

Ávísingar ........ 26

Ískoyti I – Spurnablað 1 ........ 27

Ískoyti II – Spurnablað 2 ........ 30

# Inngangur og endamál

Tá vit viðgera evnið javnstøða, er týdningarmikið at hava í huga, at hugtakið *javnstøða* ikki er eintýðugt og hevur nógvar ymiskar liðir. Ymiskir bólkar – í mun til aldur, hjúnastøðu, kyn og útbúgving v.m. - í einum samfelagi nýtast ikki at hava somu áhugamál og tískil somu áskoðanir á, hvat eitt nú hugtakið javnstøða millum kynini merkir og hvønn týdning javnstøðan hevur bæði í mun til einstaklingin og samfelagið sum heild. Um vit umrøða teir ymsu bólkarnar í einum samfelagi sum ein felags bólk, kann vandi verða fyri, at vit koma at káva útyvir, at ikki allir borgarar í einum samfelagi liva undir somu sosialu korum og kunnu tískil meira enn so hava ósambærilig áhugamál. Hetta er ein av orsøkunum til, at Javnstøðunevndin hevur heitt á Granskingardepilin fyri Samfelagsmenning at standa fyri einari kanning av hugburði til javnstøðu millum fólk í Føroyum.

Útgangsstøði hjá føroysku Javnstøðunevndini fyri at taka stig til hesa kanning hevur verið, at teimum tørvar størri innlit í, hvørja støðu serliga ófaklærd fólk hava til javnstøðu og javnstøðuspurningar. Tá javnstøða og javnstøðuspurningar verða viðgjørd í almenna rúminum í Føroyum, snúgva evnini seg í sera stóran mun um manglandi kvinnuliga umboðan í nevndum og ráðum og í politikki. Onkuntíð verður sagt í speisemi, at javnstøða er fyri “fínar konur í Havn” soleiðis at skilja: *sum eitt fyribrigdi, ið tekur støði í einari lítlari elitu av konufólkum (búsitandi í Havn) og ikki í vanliga føroyinginum*.

Fyri at fáa innlit í hvørja støðu, eittnú, ófaklærd hava til ymsar javnstøðuspuringar, er neyðugt at taka støði í , hvørja støðu fólk úr ymiskum samfelagsbólkum í mun til aldur, hjúnastøðu, kyn og útbúgving hava til javnstøðu. Á henda hátt ber til at samanbera teir ymsu bólkarnar og sostatt eisini identifisera, hvørji viðurskifti vanligi borgarin í Føroyum metir hava týdning í mun til javnstøðu millum kvinnur og menn í Føroyum. Við einari tílíkari kanning gerst samstundis lættari hjá avvarðandi myndugleikum (í hesum føri Javnstøðunevndini) at operationalisera sjónarmiðini hjá ymsum samfelagsbólkum til meiri ítøkiligt javnstøðuarbeiði.

# Dátugrundarlag

## Dátuinnsavning

Næsti spurningur er, hvussu vit fáa samband við vanliga borgarin í Føroyum - t.v.s fólk úr ymiskum samfelagsbólkum í mun til aldur, hjúnastøðu, kyn og útbúgving. Fyri at taka hædd fyri hesum vóru Føroyar undir dátuinnsavningini skipaðar sundur í 8 økir, og fór dátuinnsavningin fram við støði í hesum økjum. Umframt projektleiðara hava 8 ymisk ábyrgdarfólk frá Granskingardeplinum staðið fyri at savna spurnabløð inn.

Mannagongdin hevur verið, at ábyrgdarfólkini hava vitjað útvald arbeiðspláss/virkir og stovnar úti í økjunum. Arbeiðsplássini hava verið vald út sambært yvirlitum hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag yvir arbeiðspláss kring oyggjarnar (www.industry.fo), og harumframt eru nøkur almenn arbeiðspláss serstakliga innan Heimatænastuna og kommunum vald út sambært yvirliti yvir økir hjá Heimatænastuni (www.naerverk.fo). Heimatænastan var vald fyri at fáa fleiri kvinnur, tí á arbeiðsplássunum á privata økinum vóru menn betri umboðaðir. Á henda hátt fingu vit samband við fólk úr ymiskum samfelagsbólkum og í ymiskum sosialum støðum. Hinvegin er ein bági við hesari mannagongd, at fólk, sum leita eftir arbeiði, pensionistar og onnur, ið ikki eru á arbeiðsmarknaðinum ikki eru við í kanningini. Sjónarmiðini hjá hesum bólkum eru sjávsagt eisini týdningarmikil. Í hesari kanning er tó valt at taka støði í arbeiðsplássum. Hetta er ein effektivur háttur at fáa samband við ymiskar bólkar í samfelagnum og at tryggja eina geografiska umboðan í kanningina.

Miðað var ímóti at savna 500-700 spurnabløð inn. Samlaða talið av svaraðum spurnabløðum í kanningini er 655. Hetta kann metast at vera eitt haldgott dátugrundarlag at viðgera og meta um, hvørja støðu føroyingar hava til javnstøðu millum kvinnur og menn í Føroyum. Dátuinnsavnining fór fram í november og desember 2011.

## Fylgibólkur

Ein fylgibólkur, sum Javnstøðunevndin hevur sett, hevur verið knýttur at arbeiðinum. Við í fylgibólkinum vóru Kristianna W. Poulsen, forkvinna í Javnstøðunevndini, Leif Olsen, limur í Javnstøðunevndini, og Sonja Jógvansdóttir, samskipari hjá Samtak. Uppgávan hjá fylgibólkinum hevur verið ymisk í teimum ymsu skeiðunum av arbeiðinum, men í høvuðsheitum skal fylgibólkurin tryggja, at tað lidna arbeiðið verður "rætt og relevant". Tað hevur tí eisini verið ein uppgáva hjá fylgibólkinum at lúka møguligar villur og misskiljingar úr tilfarinum, áðrenn kanningin endaliga er latin úr hondum. Samskiftið við fylgibólkin hevur verið á fundum og umvegis teldupost.

## *Gerð av spurnablaði*

Ein av stóru avbjóðingunum í spurnakanningum sum hesari er at fáa spurnablaðið so viðkomandi sum gjørligt. Í hesum føri í mun til hvørja støðu føroyingar hava til javnstøðu og javnstøðuspurningar. Fyri so vítt gjørligt at náa hesum máli var fyrsta stigið í kanningini at skapa ein sokallaðan 'pool' av evnum og møguleikum um javnstøðu og javnstøðuspurningar. Henda mannagongd gevur innlit í, hvørji viðurskifti á javnstøðuøkinum, fólk hugsa um í gerandisdegnum/gerandislívinum. Hetta varð gjørt við at vitja 2 arbeiðspláss í landinum við einum lutvíst 'opnum' spurnablaði (sí ískoyti I). Opið spurnablað merkir í hesum føri, at fyri nakrar av spurningunum vóru svarmøguleikarnir ikki givnir frammanundan. Henda mannagongd hevur givið fólki høvi at taka viðurskifti fram, sum tey sjálvkomin hugsa um, tá talan er um javnstøðu millum kvinnur og menn. Í alt vóru 56 svargevarar í hesum innleiðandi parti av kanningini.

Síðan varð endaliga spurnablaðið sett saman, royndarkoyrt á einum arbeiðsplássi og sent til viðmerkingar hjá fylgibólkinum. Onkrar smávegis broytingar vórðu gjørdar áðrenn endaligu dátuinnsavningina. Dentur varð lagdur á, at kanningin er anonym og at einki einstakt spurnablað verður sjónligt í sjálvari kanningini. Tað er heildin, sum er áhugaverd. Hetta er umráðandi fyri trúvirðið í kanningini. Talvurnar 1, 2, 3 og 4 vísa svarað spurnabløð í mun til oyggjar/øki í landinum, kyn, aldur, útbúgving og hjúnastøðu.

Á aftasta blaði í endaliga spurnablaðnum høvdu fólk eisini høvið at skriva um viðurskifti, ið tey mettu hava týdning í mun til javnstøðu millum kvinnur og menn, men sum ikki vóru nevnd í spurnablaðnum. 69 svargevarar av teimum 655 valdu henda møguleika. Ein samandráttur og brot úr tí partinum av kanningini eru í partinum, ið verður kallaður 'Orðið er frítt.'

Vit skulu hava í huga, at kanningar sum henda ikki eru ein eintýddur svarlisti, men skulu verða støði undir kjak um javnstøðu og javnstøðuspuringar millum kvinnur og menn.

## *Umboðan í kanningini*

Tá spurnabløðini vóru komin inn, vórðu tey bólkað og svarini tøppað inn í telduforritið NSD-stat – eitt statistikktelduforrit. Talva 1 niðanfyri lýsir umboðan í mun til økir í landinum og í mun til kyn.

Vanliga bólka vit landið sundur í tey 8 økini (har eitt nú Suðurstreymoy og Streymoy annars eru skild sundur), sum vóru støði undir dátuinnsavningini. Her hava vit valt at bólka landið geografiskt í mun til oyggjar fyri at kunna bera saman við hagtøl hjá Hagstovu Føroya. Vit síggja, at geografiskt er umboðanin í kanningini sambærilig við fólkatalið, lutað sundur á oyggjar.

**Talva 1**

| | | Svarað spurnabløð | Í %[1] | Fólkatal[2] | Í % |
|---|---|---|---|---|---|
| **Bústaður** | | | | | |
| | Norðuroyggjar | 134 | 20% | 5.824 | 12% |
| | Eysturoy | 170 | 26% | 10.839 | 22% |
| | Streymoy | 194 | 30% | 22.766[3] | 47% |
| | Vágar | 63 | 10% | 3.066[4] | 6% |
| | Sandoy | 32 | 5% | 1.350[5] | 3% |
| | Suðuroy | 44 | 7% | 4.729[6] | 10% |
| | Vantar/Ikki svarað | 18 | 3% | ////////// | /////// |
| **Tilsamans** | | 655 | 100% | 48.574 | 100% |
| **Kyn** | | | | | |
| | Kvinnur | 288 | 44% | 23.347 | 48% |
| | Menn | 359 | 55% | 25.227 | 52% |
| | Vantar/Ikki svarað | 8 | 1% | ////////// | /////// |
| **Tilsamans** | | 655 | 100% | 48.574 | 100% |

Í mun til kyn eiga vit at leggja til merkis, at menn eru eitt vet betur umboðaðir í mun til samlaða talið av svargevarum. Havast skal í huga her, at í Føroyum búgva fleiri menn enn kvinnur og at hetta tískil eisini kemur at ávirka, hvussu býtið verður millum kynini í mun til samlaða talið av svaraðum spurnabløðum.

Aldur og hjúnastøðu hjá teimum spurdu síggja vit í talvunum 2 og 3. Sum vit síggja, er aldursbýtið stórt. Yngstu svargevararnir eru 15 ár og elstu eru 72. Miðaldurin á teimum, sum eru við í kanningini, er 40 ár.

**Talva 2**

| Aldur á teimum spurdu | Tal | Í % |
|---|---|---|
| 15-28 | 146 | 25% |
| 29-42 | 190 | 32% |
| 43-56 | 171 | 29% |
| 57-72 | 82 | 14% |
| **N= 589** | | |

[1] Í mun til svarað spurnabløð tilsamans.
[2] Fólkatal í januar 2011; kelda: www.hagstova.fo.
[3] Íroknað Nólsoy, Hestur og Koltur.
[4] Íroknað Mykines.
[5] Íroknað Skúgvoy.
[6] Íroknað Stóra Dímun.

Flestu av teimum spurdu eru gift ella sambúgvandi. Merkisvert er tó, at 24% av teimum spurdu eru støk.

**Talva 3**

| Hjúnastøða hjá teimum spurdu | Tal | Í % |
|---|---|---|
| Gift(ur)/Sambúgvandi | 450 | 71% |
| Einkja/Einkjumaður | 13 | 2% |
| Stakur/Støk | 150 | 24% |
| Fráskild(ur) | 17 | 3% |
| **N= 630** | | |

Hyggja vit eftir útbúgving hjá teimum spurdu, síggja vit í talvu 4, at ein meiriluti av teimum hava handverkara- ella yrkisútbúgving. Av teimum, ið hava handverkara- ella yrkisútbúgving, er kynsbýtið ávikavist 28% kvinnur og 72% menn.

Viðgerð og greining av, hvørja støðu føroyingar hava til javnstøðu millum kvinnur og menn, fer serliga at taka støði í kyni og útbúgving. Tað vil siga, hvørja støðu ávikavist kvinnur og menn hava, sæð í mun til hvørja útbúgving, ið tey hava . Hetta gevur okkum eina ábending um, hvørji viðurskifti fólk meta hava týdning. Hetta er samstundis eitt gott støði undir kjak um javnstøðu og javnstøðuspuringar millum kvinnur og menn.

**Talva 4**

| Skúlagongd hjá teimum spurdu | Tal | Í % |
|---|---|---|
| Fólkaskúla 7 ár | 51 | 8% |
| Fólkaskúla 9/10 ár | 158 | 25% |
| Miðnámsskúla | 117 | 18% |
| Handverkara- ella yrkisútbúgving | 194 | 30% |
| Millumlanga, hægri útbúgving (3 ár) | 103 | 16% |
| Longri, hægri lærustovni (5 ár ella longri) | 18 | 3% |
| **N=641** | | |

Spurningarnir um skúlagongd ella útbúgving hjá teimum spurdu (talva 4) eru flokkaðir í 3 bólkar: *fólkaskúli ella miðnámsskúli* (fólkaskúli 7, 9 ella 10 ár og miðnámsskúli), *handverkara- ella yrkisútbúgving* og *hægri lærustovnur* (3 ár ella longrr)i. Við hesari flokking fáa vit eina mynd av, hvørja støðu fólk við og uttan útbúgving hava til javnstøðu.

Býtið í mun til kyn og útbúgving er lýst í talvu 5.

**Talva 5**

| Útbúgving | Kvinnur | Menn | N= |
|---|---|---|---|
| Fólkaskúli ella miðnámsskúli | 56% | 44% | **324** |
| Handverkara- ella yrkisútbúgving | 28% | 72% | **194** |
| Hægri lærustovnur (3 ár ella longri) | 41% | 59% | **121** |

Bygnaður av frágreiðing er skipað soleiðis. Fyrst verður javnstøða viðgjørd í mun til hvørja støðu kvinnur og menn hava til evnið, síðan hvørja støðu fólk við ymskari útbúgving hava og at enda verður tann kvalitativi parturin av kanningini viðgjørdur  (t.e. aftasta blað í spurnablaðnum, spurnablað II).

# Hvørja støðu hava kvinnur og menn til javnstøðu

## *Verður tosað um javnstøðu*

Talva 5 lýsir, hvussu nógv av teimum spurdu siga seg tosa um javnstøðu við onnur. Nærum helvtin av bæði kvinnum og monnum tosa um evnið við onnur.

**Talva 6**

| **Tosar tú við onnur um javnstøðu millum kvinnur og menn í Føroyum?** | **Kvinnur** | **Menn** |
|---|---|---|
| Ja | 44% | 46% |
| Nei | 56% | 54% |
| Í alt | 100% | 100% |
| **N=** | **276** | **350** |

Vit spurdu eisini um, við hvønn tey tosaðu um javnstøðu. Svarið upp á hendan spurningin síggja vit á mynd 1 og 2. Bæði kvinnur og menn tosa mest um evnið í almenna rúminum. Tó so. Tey tosa eisini um evnið í privatu sferuni, men minst við børnini. Samanbering millum kvinnur og menn vísir, at kvinnur tosa við børnini um evnið í størri mun enn menn.

Ábyrgdarfólkini greiddu frá, at dátuinnsavningin setti gongd á kjakið um javnstøðu úti á arbeiðsplássunum. Onkur greiddi frá, at á summum arbeiðsplássum kjakaðust starvsfólkini um evnið restina av arbeiðsdegnum eftir dátuinnsavningina.

Spurningurin svarar ikki, nær tey tosa um evnið og í hvørjum støðum, tað kemur upp. Í næsta parti greina vit, hvørji viðurskifti, menn og kvinnur í Føroyum meta, eru millum størstu javnstøðutrupulleikarnar millum kvinnur og menn.

**Mynd 1**




* Legg til merkis, at tey kundu seta fleiri krossar og tí verður samlaða talið ikki 100%.
Tølini eru í mun til tey, sum siga seg tosa um javnstøðu.

**Mynd 2**




* Legg til merkis, at tey kundu seta fleiri krossar og tí verður samlaða talið ikki 100%.
Tølini eru í mun til tey, sum siga seg tosa um javnstøðu.

## *Hvørjar meta kvinnur og menn vera teir størstu javnstøðutrupulleikarnar*

Fólk vórðu biðin um at raðfesta, hvørjir 5 javnstøðuspurningar høvdu størsta týdning. Svarini upp á hetta eru lýst í myndunum 3 og 4. Mynd 3 lýsir sjónarmiðini hjá kvinnum; mynd 4 hjá monnum. Kvinnur meta, at lønarmunur, vantandi kvinnulig umboðan í politikki og vantandi umboðan í nevndum í vinnulívinum eru millum størstu trupulleikarnar. Merkisvert er, at trupulleikin við, at menn verða verri útbúnir enn kvinnur hevur lægstu raðfesting. Eisini eiga vit at leggja til merkis, at mammur taka størsta partin av burðarfarloyvinum hevur lága raðfesting sum ein trupulleiki. Hetta er eitt øki, ið javnan verður kjakast um í almenna rúminum. Í kanningini um kyn og vælferð (Knudsen, 2010) varð mett, at tað at kvinnur taka størra partin av barnsburðarfarloyvinum hevur stóra ávirkan á støðuna millum menn og kvinnur bæði á arbeiðsmarknaðinum og í heiminum. Kvinnan fær størru ábyrgdina av heiminum, við tað at hon er heima í longri tíðarskeið og verður arbeiðsbýtið í heiminum skipað hareftir.

**Mynd 3**




* Legg til merkis, at tey kundu velja fimm ymisk viðurskifti, og tí verður samlaða talið ikki 100%. Tølini eru í mun til spurdar kvinnur í alt.

Ónøgdin við lønarmunin millum kvinnur og menn kemur eisini fram í aðrari kanning um kvinnur og vælferð í Føroyum.[7] Føroyski parturin av hesari kanning, sum byggir á samrøður kring landið, vísir, at kvinnur halda, at líka løn hevur sera stóran týdning fyri javnstøðuna millum kvinnur og menn í Føroyum.

**Mynd 4**




* Legg til merkis, at tey kundu velja fimm ymisk viðurskifti, og tí verður samlaða talið ikki 100%. Tølini eru í mun til spurdar menn í alt.

Hyggja vit eftir, hvørja støðu menn hava, sær myndin nakað øðrvísi út. Menn halda, at javnstøða millum kvinnur og menn er eingin trupulleiki í Føroyum. Hendan hugburðin síggja vit eisini í viðmerkingunum á aftasta blaði í spurnablaðnum (‘Orðið er frítt’).

At stórur munur er á inntøkunum hjá kvinnum og monnum sum ein trupulleiki hevur miðalraðfesting hjá monnum. Hví so man vera, kunnu vit bert gita um. Vit hava ikki aðrar føroyskar kanningar at halda okkum til, sum lýsa hugburð hjá føroyskum monnum til javnstøðu.

[7] Sí Knudsen, Karin J.L. Í Rafsndóttir, G.L, (2010). Kvinder og velfærd i Vestnorden. http://www.norden.org/da/publikationer/publikationer/2010-578.

Ikki er óhugsandi, at menn síggja seg sjálvar sum høvuðsuppihaldarar í familjuni og sostatt ikki meta inntøkumunin at hava stórvegis týdning. At kvinnur hava høvuðsábyrgd av heiminum er millum 5 teir størstu javnstøðutrupulleikarnar hjá kvinnum, men tann næstlægsti hjá monnum. Hugsandi er, at hesin hugburður endurspeglar, at traditionellu kynsleiklutirnir framvegis eru ráðandi í heiminum, og at kvinnur vísa eina ávísa ónøgd vit hetta.

Hinvegin meta mannfólkini, at tað er ein trupulleiki, at ov fáir menn taka barnsburðarfarloyvi og at ov fáir menn er í umsorganarstørvum. At ov fáir menn taka barnsburðarfarloyvi meta kvinnur ikki at vera sama trupulleika. Hinvegin so meta tær eisini, at ov fáir menn eru í umsorganarstørvum.

Kvinnur og menn eru samd um, at fáar kvinnufyrimyndir í frálærutilfari ikki er ein stórur trupulleiki. Hetta er møguliga ov háfloygt og liggur fjart frá meira ítøkiligum javnstøðutrupulleikum og fær tískil eina lága raðfesting. Eisini er hugsandi, at svarini í ein ávísan mun endurspegla teir spurningar um javnstøðu, sum koma fram í almenna rúminum.

Somuleiðis vísir kanningin, at bæði menn og kvinnur ikki meta tað støðu, at menn verða verri útbúnir enn kvinnur sum ein stórvegis trupulleika. Hesin hugburður eigur at vekja ans í politisku skipanini og í føroyska samfelagnum. Vit liva í eini tíð, har formaliserað vitan, útbúgving og førleikar eru av alstórum týdningi fyri, hvørjar menningarmøguleikar bæði einstaklingar og samfeløg sum heild hava fyri at klára seg og kunna kappast við onnur í einum globaliseraðum heimi.

## *Skulu myndugleikar lóggeva um javnstøðu*

Kjakið um, hvørt myndugleikar skulu lóggeva um kynsumboðan (kvotur) á ymsum økjum í samfelagnum, stingur seg upp javnan. Eitt nú verður kjakast í ES-høpi, um myndugleikar skulu lóggeva um kynsumboðan í nevndum í vinnulívinum, tí kvinnur eru undirumboðaðar har.[8]

**Talva 7**

| **Skulu myndugleikar lóggeva um at oyramerkja ein størri part av barnsburðarfarloyvinum til pápar?** | **Kvinnur** | **Menn** |
|---|---|---|
| Ja | 29% | 36% |
| Nei | 71% | 64% |
| Í alt | 100% | 100% |
| **N=** | **231** | **312** |

[8] Sí til dømis Europa-Parlamentet/Nyheder, http://www.europarl.europa.eu/news/da/headlines/content/20110520STO19890/html/MEP%C2%B4ere-%C3%B8nsker-flere-kvinder-i-bestyrelserne

Hetta er eitt umstrítt evni. Føroyska Javnstøðulógin staðfestir, at 'ráð, umboð og líknandi, sum fyrisitingarvaldið útnevnir, skulu verða sett saman soleiðis, at umleið eins nógvir limir av báðum kynum eru umboðaðir...'[9] Ein meiriluti í hesari kanning – bæði kvinnur og menn – halda ikki, at myndugleikarnir skulu løggeva um størri part av barnsburðarfarloyvinum til menn, javnari býti av kvinnum og monnum í nevndum í vinnulívinum ella javnari býti av kvinnum og monnum í Løgtinginum og í bý- og bygdarráðum. Vit eiga tó at leggja til merkis, at meiri enn 1/3 av monnunum í hesari kanning halda, at myndugleikar skulu løggeva ein størri part av barnsburðarfarloyvinum til pápar. Samanhildið við raðfesting, ið hetta hevur smb. mynd 4, eru væl av monnum, sum meta vantandi barnsburðarfarloyvi hjá monnum sum ein javnstøðutrupulleika. Somuleiðis halda meira enn 1/3 av kvinnunum, at myndugleikarnir eiga at løggeva um umboðan í nevndum í vinnulívinum.[10]

**Talva 8**

| **Skulu myndugleikar løggeva um javnari býti av kvinnum og monnum í nevndum í vinnulívinum?** | **Kvinnur** | **Menn** |
|---|---|---|
| Ja | 36% | 19% |
| Nei | 64% | 81% |
| Í alt | 100% | 100% |
| **N=** | **234** | **306** |

**Talva 9**

| **Skulu myndugleikar løggeva um javnari býti av kvinnum og monnum í Løgtinginum og í bý- og bygdarráðum?** | **Kvinnur** | **Menn** |
|---|---|---|
| Ja | 30% | 18% |
| Nei | 70% | 82% |
| Í alt | 100% | 100% |
| **N=** | **226** | **309** |

## *Skulu myndugleikar, arbeiðspláss og skúlar seta tiltøk í verk*

Í mun til at seta ítøkilig tiltøk í verk fyri at fremja javnstøðu millum kvinnur og menn hava á leið helmingurin av kvinnunum positivan hugburð og á leið 1/3 av monnunum.

**Talva 10**

| **Heldur tú, at myndugleikarnir í Føroyum áttu at sett ítøkilig tiltøk í verk fyri at betra um javnstøðuna millum kvinnur og menn í Føroyum?** | **Kvinnur** | **Menn** |
|---|---|---|
| Ja | 50% | 34% |
| Nei | 50% | 66% |
| Í alt | 100% | 100% |
| **N=** | **267** | **347** |

[9] Sí føroysku javnstøðulógina, http://www.logir.fo/foldb/llofo/1994/0000052.htm#partur5
[10] Sí eisini viðgerð av føroysku javnstøðulógini og implementering av ásetingini um kynsumboðan í nevndum í mun til almenn partafeløg (Knudsen, 2009: 323), http://www.norden.org/da/publikationer/publikationer/2009-569

Viðmerkjast skal, at talan er um ja/nei spurningar og tískil kunnu tiltøk snúgva seg um nógv ymiskt, tá fólk svara.

Bera vit hugburðin til tiltøk saman við hugburði til lóggeving, er hugburðurin til tiltøk positivari enn til lóggeving.

**Talva 11**

| **Heldur tú, at arbeiðspláss í Føroyum áttu at sett ítøkilig tiltøk í verk fyri at betra um javnstøðuna millum kvinnur og menn í Føroyum?** | **Kvinnur** | **Menn** |
|---|---|---|
| Ja | 51% | 33% |
| Nei | 49% | 67% |
| Í alt | 100% | 100% |
| **N=** | **266** | **348** |

At nærum helmingurin av kvinnunum og væl meiri enn 1/3 av monnunum halda, at skúlar áttu at sett tiltøk í verk fyri at betra um javnstøðuna, tykist at vera í andsøgn við lágu raðfestingina um ov fáar kvinnufyrimyndir í frálærutilfari, sum ein metir at vera ein trupulleiki (myndirnar 3 & 4). Hetta er eitt øki, ein kundi ímynda sær var partur av tiltøkum á skúlum, ið skulu fremja javnstøðu millum kvinnur og menn.

**Talva 12**

| **Heldur tú, at skúlar í Føroyum áttu at sett ítøkilig tiltøk í verk fyri at betra um javnstøðuna millum kvinnur og menn í Føroyum?** | **Kvinnur** | **Menn** |
|---|---|---|
| Ja | 48% | 40% |
| Nei | 52% | 60% |
| Í alt | 100% | 100% |
| **N=** | **266** | **347** |

# Hvørja støðu hava fólk við ymiskari útbúgving til javnstøðu

## *Verður tosað um javnstøðu*

Talva 13 vísir eina lýsing av spurninginum um, hvørt fólk tosa við onnur um javnstøðu á sama hátt sum talva 5, men í mun til útbúgving. Merkisvert er, at myndin verður eitt vet øðrvísi, tá vit greina spurningin í mun til útbúgving.

Vit síggja á talvuni, at 60% av teimum við longri útbúgving siga seg tosa um javnstøðu í mun til ávikavist 40% og 46% hjá hinum bólkunum, sum er meira líkt, tá vit lýsa spurningin í mun til kyn. Sostatt bendir kanningin á, at fólk við hægri útbúgving tosa í størri mun um javnstøðu millum kynini. Á myndunum 5, 6 og 7 síggja vit svarini upp á spurningin, við hvønn tey tosa um javnstøðu. Tá vit greina spurningin, í mun til hvønn tey tosa við, eru í fyrstu atløgu ikki stórvegis munir millum bólkarnar.

Tó so. Kanningin bendir á, at tey við hægri útbúgvingum, umframt at tey tosa meira um javnstøðu sambært tølunum,  tosa meira við makar og børn um evnið samanborið við hinar bólkarnar.

**Talva 13**

| **Tosar tú við onnur um javnstøðu millum kvinnur og menn í Føroyum?** | **Fólkaskúla ella miðnámsskúla** | **Handverkara- ella yrkisútbúgving** | **Hægri lærustovni (3 ár ella longri)** |
|---|---|---|---|
| Ja | 40% | 46% | 60% |
| Nei | 60% | 54% | 40% |
| Í alt | 100% | 100% | 100% |
| **N=** | **315** | **192** | **114** |

Samanumtikið um hendan partin av kanningini kunnu vit staðfesta, at allir bólkar (kyn ella útbúgving) tosa oftast við starvsfelagar og vinfólk um javnstøðu, og at kvinnur og fólk við hægri útbúgving í størri mun tosa við børnini um evnið.  Kanningin vísir, at fólk við hægri útbúgving tosa oftari enn hinir bólkarnir um evnið. Viðmerkjast skal, at kanningin sigur einki um, í hvørjum støðum fólk taka evnið upp, og júst hvat tey tosa um.

**Mynd 5**




* Legg til merkis, at tey kundu seta fleiri krossar og tí verður samlaða talið ikki 100%.
Tølini eru í mun til tey, sum siga seg tosa um javnstøðu.

**Mynd 6**




* Legg til merkis, at tey kundu seta fleiri krossar og tí verður samlaða talið ikki 100%.
Tølini eru í mun til tey, sum siga seg tosa um javnstøðu.

**Mynd 7**




* Legg til merkis, at tey kundu seta fleiri krossar og tí verður samlaða talið ikki 100%.
Tølini eru í mun til tey, sum siga seg tosa um javnstøðu.

## *Hvørjir meta ymiskir bólkar vera størstu javnstøðutrupulleikarnar*

Tá vit greina, hvørjar 5 javnstøðuspurningar, fólk við ymiskari útbúgving raðfesta, síggja vit, at spurningurin um, at menn verða verri útbúnir enn kvinnur hevur lága raðfesting hjá øllum trimum bólkunum – myndirnar 8, 9 og 10. Somu raðfesting sóu vit í mun til bæði kvinnur og menn.

**Mynd 8**




* Legg til merkis, at tey kundu velja fimm ymisk viðurskifti, og tí verður samlaða talið ikki 100%. Tølini eru í mun til spurd í alt í bólkinum.

Vit kunnu staðfesta, at fólk ikki meta tað støðu, at menn verða verri útbúnir enn kvinnur sum ein stórvegis javnstøðutrupulleika. Ilt er at siga, hví fólk hava hendan hugburð. Hetta kunnu vit bert gita um. Eins og spurningurin um kvinnufyrimyndir í lærubókum, so verður hendan støðan ikki nógv umrødd í almenna orðaskiftum um javnstøðu millum kvinnur og menn. Ikki er óhugsandi, at hetta í ein ávísan mun endurspeglast í lágu raðfestingni evnið fær.

Hinvegin eigur hesin hugburður at vekja ans í føroyska samfelagnum sum heild. Formaliserað vitan, útbúgving og førleikar eru avgerðandi fyri, hvussu vit sum einstaklingar og samfeløg klára okkum í einum globaliseraðum heimi.

Vit vita, at ungar kvinnur í størri mun enn menn nema sær miðnámsútbúgvingar og nógvar kvinnur flyta uttanlands at lesa. Vit vita eisini, at tað eru á leið 2.000 færri kvinnur enn menn í Føroyum.[11] Henda støðan kann heilt skjótt gerast ein týðandi javnstøðu- og samfelagstrupulleiki fyri føroyska samfelagið.

Mynd 9 vísir, hvørja støðu fólk við handverkara- ella yrkisútbúgivng hava. Her eiga vit at leggja til merkis, at hesin bólkar ikki heldur, at javnstøða millum kvinnur og menn er ein stórvegis trupulleiki. Við tað at ein meiriluti av svargevarunum í hesum bólki eru menn (72%) avmyndar hetta uttan iva somu støðu, sum vit síggja á mynd 4. Vit eiga eisini at leggja til merkis, at ov fáir menn í umsorganarstørvum verður hildið at vera ein trupulleiki í hesum bólkinum. Sjónarmið, sum vit eisini síggja í mun til sjónarmiðini hjá monnum sum heild. Hetta meta tey við ongari útbúging eisini at vera ein trupulleika.

**Mynd 9**




* Legg til merkis, at tey kundu velja fimm ymisk viðurskifti, og tí verður samlaða talið ikki 100%. Tølini eru í mun til spurd í alt í bólkinum.

[11] Sambært tølum hjá Hagstovu Føroyar vóru 25.227 menn og 23.347 kvinnur í Føroyum í januar 2011.

**Mynd 10**




* Legg til merkis, at tey kundu velja fimm ymisk viðurskifti, og tí verður samlaða talið ikki 100%. Tølini eru í mun til spurd í alt í bólkinum.

Samanbera vit, hvørja støðu teir tríggir fakbólkarnir hava til lønarmunin millum kvinnur og menn, síggja vit, at fólk eru samd um, at hetta er millum 5 teir størstu trupulleikarnar. Hetta ger seg eisini galdandi í mun til støðuna, tá talan er um, at ov fáar menn eru í umsorganarstørvum.

Kanningin vísir eisini, at nakrir av teimum javnstøðuspurningunum, sum vanliga verða havdir á lofti í almenna rúminum, tá vit kjakast um javnstøður, fáa høga raðfesting millum tey við hægru útbúgvingunum.

Hinvegin so hevur tað, at ov fáir pápar taka barnsburðarfarloyvi, lægri raðfesting millum teirra við hægru útbúgvingunum enn hjá hinum báðum bólkunum.

Á sama hátt sum lýsingin av støðuni hjá kvinnum og monnum staðfestir, so síggja við eisini somu sjónarmið hjá fólki við ymiskari útbúgving. Fáar kvinnufyrimyndir í frálærutilfari verður ikki mett at vera ein stórvegis trupulleiki í mun til javnstøðuna millum kvinnur og menn.

Sum nevnt omanfyri, verður hesin spurningur ikki nógv umrøddur í almenna orðaskiftinum eins og eittnú kvinnuumboðan í almennum nevndum og ráðum. Hetta endurspeglast ivaleyst í raðfestingin, ið fólk hava.

## *Skulu myndugleikar lóggeva um javnstøðu*

Á sama hátt sum vit hava fingið staðfest í fyrra partinum, tá vit lýstu støðuna í mun til kyn, heldur ein meiriluti av teimum spurdu, við støði í hvørja útbúgving tey hava, at myndugleikar ikki eiga at lóggeva um javnstøðu millum kvinnur og menn, tá talan er um:

- at oyramerkja ein størri part av barnsburðarfarloyvinum til pápar
- lóggeva um javnari býti av kvinnum og monnum í nevndum í vinnulívinum
- lóggeva um javnari býti av kvinnum og monnum í Løgtinginum og í bý- og bygdarráðum

**Talva 14**

| **Skulu myndugleikar lóggeva um at oyramerkja ein størri part av barnsburðarfarloyvinum til pápar?** | **Fólkaskúla ella miðnámsskúla** | **Handverkara- ella yrkisútbúgving** | **Hægri lærustovni (3 ár ella longri)** |
|---|---|---|---|
| Ja | 34% | 33% | 33% |
| Nei | 66% | 67% | 67% |
| Í alt | 100% | 100% | 100% |
| **N=** | **266** | **170** | **102** |

**Talva 15**

| **Skulu myndugleikar lóggeva um javnari býti av kvinnum og monnum í nevndum í vinnulívinum?** | **Fólkaskúla ella miðnámsskúla** | **Handverkara- ella yrkisútbúgving** | **Hægri lærustovni (3 ár ella longri)** |
|---|---|---|---|
| Ja | 33% | 14% | 27% |
| Nei | 67% | 86% | 73% |
| Í alt | 100% | 100% | 100% |
| **N=** | **264** | **162** | **107** |

**Talva 16**

| **Skulu myndugleikar løggeva um javnari býti av kvinnum og monnum í Løgtinginum og í bý- og bygdaráðum?** | **Fólkaskúla ella miðnámsskúla** | **Handverkara- ella yrkisútbúgving** | **Hægri lærustovni (3 ár ella longri)** |
|---|---|---|---|
| Ja | 29% | 16% | 23% |
| Nei | 71% | 84% | 77% |
| Í alt | 100% | 100% | 100% |
| **N=** | **262** | **164** | **103** |

Sjónarmiðini býta seg nøkulunda javnt, tá talan er um at oyramerkja ein størri part av barnsburðarfarloyvinum til pápar. Á leið 2/3 ynskja ikki løggeving. Hinvegin, tey við handverkara- ella yrkisútbúgving líkjast eitt sindur frá, tá spurningurin snýr seg um at løggeva um kvotur í politisku skipanini og í nevndum í privatu vinnuni. Ávikavist 86 % og 84% halda ikki, at myndugleikarnir skulu løggeva um hetta.

Talva 5 omanfyri vísir, at ein meiriluti av teimum, sum eru við í kanningini við handverkara- ella yrkisútbúgving og teimum við hægri útbúgving eru menn, meðan tað eru eitt vet fleiri kvinnur í bólkinum fólkaskúli ella miðnámsskúli. Samanbera vit úrslitini í talvunum 15 og 8 (omanfyri), síggja vit, at menn í størri mun enn kvinnur ikki halda, at myndugleikar skulu løggeva um javnari umboðan av kvinnum og monnum í nevndum í vinnulívnum og í politsku skipanini. Vit fingu eisini staðfest á mynd 4 omanfyri, at javnstøðatrupulleikin millum kvinnur og menn í Føroyum ikki hevur eina høga ræðfesting hjá monnunum, ið eru við í hesari kanning.

## *Skulu myndugleikar, arbeiðspláss og skúlar seta tiltøk í verk*

Á leið somu sama ger seg galdandi, tá vit hyggja at, hvørt myndugleikar og stovnar skulu seta tiltøk í verk. Hugburðurin postivari mótvegis at seta tiltøk i verk heldur enn at løggeva.

**Talva 17**

| **Heldur tú, at myndugleikarnir í Føroyum áttu at sett ítøkilig tiltøk í verk fyri at betra um javnstøðuna millum kvinnur og menn í Føroyum?** | **Fólkaskúla ella miðnámsskúla** | **Handverkara- ella yrkisútbúgving** | **Hægri lærustovni (3 ár ella longri)** |
|---|---|---|---|
| Ja | 44% | 33% | 44% |
| Nei | 56% | 67% | 56% |
| Í alt | 100% | 100% | 100% |
| **N=** | **308** | **186** | **114** |

**Talva 18**

| **Heldur tú, at arbeiðspláss í Føroyum áttu at sett ítøkilig tiltøk í verk fyri at betra um javnstøðuna millum kvinnur og menn í Føroyum?** | **Fólkaskúla ella miðnámsskúla** | **Handverkara- ella yrkisútbúgving** | **Hægri lærustovni (3 ár ella longri)** |
|---|---|---|---|
| Ja | 42% | 37% | 40% |
| Nei | 58% | 63% | 60% |
| Í alt | 100% | 100% | 100% |
| **N=** | **306** | **189** | **113** |

**Talva 19**

| **Heldur tú, at skúlar í Føroyum áttu at sett ítøkilig tiltøk í verk fyri at betra um javnstøðuna millum kvinnur og menn í Føroyum?** | **Fólkaskúla ella miðnámsskúla** | **Handverkara- ella yrkisútbúgving** | **Hægri lærustovni (3 ár ella longri)** |
|---|---|---|---|
| Ja | 44% | 41% | 45% |
| Nei | 56% | 59% | 55% |
| Í alt | 100% | 100% | 100% |
| **N=** | **308** | **185** | **114** |

Kortini síggja vit, at ein meiriluti heldur ikki, at tiltøk skulu setast í verk. Tó eru fleiri við hægri útbúgvingum, sum eru fyri hesum, ið talvurnar 17, 18 og 19 vísa. Eisini síggja vit, at sjónarmiðini býta seg næstan 50-50, tá talan er um at seta tiltøk í verk á skúlum.

# Orðið er frítt

Tann kvalitativi parturin av kanningini (viðmerkingar á aftasta blað í spurnablaðnum) vísir í høvuðsheitum trí ymisk viðurskifti, ið fólk hava hug at taka fram:

- Vantandi páparættindi
- Javnstøða er eingin trupulleiki
- Um at lóggeva um javnstøðu

Niðanfyri eru viðmerkingar endurgivnar, ið eru umboðandi fyri sjónarmiðini nevnt omanfyri.

Brotini eru endurgivin soleiðis just soleiðis sum svargervarnir hava skriva tey.

## Vantandi páparættindi

*"Hægsta útgjald úr barsilsgrunninum er sett til 25.000 kr/mdr. Kanska tað er høvuðsgrundin til at mannfólk, omanfyri hesa mánaðarligu inntøku, ikki fara í barsil. Ikki lóggeva fyri javnstøðu!!!"*

Kvinna, 30 ár, handverkara- ella yrkisútbúgving

*"At mamman og pápin hava líka stóran rætt yvir barninum, og tann lógin blívur fornýggja!"*

Kvinna, 17 ár, fólkaskúla 9/10 ár

*" Tað skuldi veri møguleiki at svara anna enn ja og nei. Eg sum maður sakni spurningar um heimi ella barnauppæling, har eg haldi at kvinnan hevur alt at siga. Tað er undarlíkt at siga at menn vinna meira pening og tí pensión, enn kvinnur, vit arbeiða nógv meira í tímum. Hvussu við rættindunum hjá manninum at fáa børn og foreldramynduleika?"*

Maður, 50ár, millumlanga, hægri útbúgving (3 ár)

*"At mammur hava for nógva makt yvir BØRNUNUM[/] FORELDRA MYNDULEIKA[.] nógvar mammur er ikki egnaðar. Tað veit eg frá mær sjálvum og tað er for stórur munur."*

Maður, aldur: ?, handverkara- ella yrkisútbúgving

*"Rættindini hjá einligum/stakum pápum eru – í mun til einligar/stakar mammur – út av lagi vánalig. Mammur eru, næstan uttan undantak, sjálvskrivaðar til børnini, hetta er út av lagið vánaligt!"*

Maður, 38 ár, miðnámsskúla

*"Spurningarnir undra meg. Her eru eingir spurningar um rættindi hjá monnum í samband við hjúnaskilna. Javnstøðunevndin er bara fyri kvinnur, menn hava eingi rættindi."*

Maður, 52 ár, millumlanga, hægri útbúgving (3 ár)

*"Javnstøða ímillum kyn til samveru við børn síni, lógin er út av lagi vánalig sum er, javnstøðu nevndin skuldi arbeitt fyri bæði kynini hesum viðvíkjandi."*

Maður, 43 ár, handverka- ella yrkisútbúgving

## *Javnstøða er eingin trupulleiki*

*"Eg haldi at tað er týdningarmikkið at fólk fáa betri forstáilsi av hvat tað merkir at fáa javnstøðu. Annars virkar tað sum um vit ið siga nakað eru reyðsokkar."*

Kvinna, 33 ár, miðnámsskúla

*"Tað eru nakrar fáar kvinnur sum gera javnstøðuna til ein trubuleika!!"*

Maður, 34 ár, fólkaskúla 9/10 ár

*"Rákið í tíðini skapar ein fjákutan og ógrundaðan offurmentalitet millum eliterar konur í miðstaðarøkinum. Talan er óivað um eitt seinkað afturljóð úr útheiminum, tá ið militantir, grýtukliptir betonglebbarar gjørdu innrás í ansingar- og lærustovnum í fyrru helvt av sjeytiárunum.*

*Andligi bulurin í rákinum tykist vera treytaður av, at kvinnur skulu styrkjast og stimbrast við at kanna sær ein offurleiklut í samfelagnum. Tær eru eftir øllum at døma so veikar og óhjálpnar, at serlig atlit mugu takst til teirra, tá ið lógir verða smíðaðar. Skal hetta slagið av systrasolidariteti, sprottið og missioneráð úr ideologiskari høvuðsstøð í Tórshavn, eitast at fjálga um sjálvsálitið hjá kvinnum um alt Føroya land?*

*Onkursvegna ivist eg í, um hetta fer at gagna javnstøðuni í samfelagnum. Brúkið heldur orkuna til at stríðast fyri kvinnurættindum í muslimska heiminum. Har er so eingin ivi um støðuna og leiklutin hjá vakra kyninum."*

Maður, 38 ár, miðnámsskúla

*"Tær liggja sum tær hava reitt."*

Maður, aldur ?, handverkara- ella yrkisútbúgving

*"Konan skal vera heima og passa børn meðan tey eru smá. Maðurin skal forsyrgja teimum."*

Maður, 57 ár, fólkaskúla 7 ár

*"Javnstøðan er ongin trupuleiki!!! tað stendur øllum fulkomiliga frítt, at gera tað, tey vilja. Fjølmiðlar og polittikarar og ("reyðsokkar") gerða javnstøðuna til ein trubuleika í FØROYUM."*

Maður, 44 ár, handverkara- ella yrkisútbúgving

*"Arbeiðsbýti er soleiðis hátta sum tað er, vit skulu MINNAST TIL AT 1000 til 2000 menn/PÁPAR eru í útsigling ella arbeiða uttanlanda, hvør skal so ansa børnunum."*

Maður, aldur ?, millumlanga, hægri útbúgving (3 ár)

*"Hetta evnið telur alt ov nógv í fjølmiðlunum í mun til tær avbjóðingar landið hevur. Tað ljóðar næstan sum um fólkið keðir seg, hevur ov lítið uppá hjarta."*

Maður, 59 ár, longri, hægri lærustovni (5 ár ella longri)

*“Um fleiri kvinnur skulu í politik so hevði ein ide veri at kvinnurnar stemmaðu uppá sítt kyn vit eru mær vitandi ca 50% av hvørjum slagið, so grenja minni og vel.”*

Maður, 45 ár, millumlanga, hægri útbúgivng (3 ár)

*“Kvinnan hevur valratt so har er eingin trupuleiki!”*

Maður, 53 ár, handverkara- ella yrkisútbúgving

*“Javnstøða er ikki ein truppuleiki í Føroyum.”*

Maður, 32 ár, longri, hægri lærustovni (5 ár ella longri)

*“Kvinnur skulu verða stoltar av at verða kvinnur, og ikki royna at verða sum menn. Vit eru fødd við ymsum eginleikum, og skulu brúka teir. Tær kvinnur sum brúka teir hava størri møguleika at koma fram enn reyðsokkurin. Fyri at tað skal lata seg gera, skal maðurin sjálvandi taka ábyrgd í øllum viðurskiftum í húsarhaldinum. Tað er bætnandi hesum viðv. Vit síggja fleiri og fleri kvinnur í leiðandi størvum og tað er gott ☺”*

Maður, 46 ár, handverkara- ella yrkisútbúgving

## Um at lóggeva um javnstøðu

*“Tað at menn velja menn í nevndir –(Ripa - Rap og Rup effektin) er ringt at sleppa undan uttan lóggeving eitt áramál.”*

Kvinna, 49 ár, millumlanga, hægri útbúgving (3 ár)

*“Landið er frítt, lat tað verða frítt. Ongar lóg gevingar, tað skal tillaga seg sjálvt.”*

Maður, 38 ár, handverkara- ella yrkisútbúgving

*“Sjálvandi haldi eg, at kvinnur sjavlsagt skulu hava øll rættindi sum menn og menn somu rættindi sum kvinnur, men at lóggeva at helvtin av løgtinginum skulu vera kvinnur, er ein beinleiðis hóttan í móti demokratiinum, tí fólkið skal bestemma hvør situr í Løgtinginum og ikki lógir. P. S. At gera lógir til fyrimun fyri annað Kynið, fær tað at síggja veikt út!”*

Maður, 23 ár, miðnámsskúla

*“Lóggeving kann í nøkrum førum vera vandamikil, eitt nú um vit fara at noyða vinnulívið at býta javnt millum kynini, men tó mugu vit viðurkenna tey úrslit onnur demokratisk “grannalond” hava havt við at lóggeva á politiska økinum hvat viðvíkur javnstøðu.”*

Maður, 33 ár, miðnámsskúla

*“Kvinnur eiga at halda seg meira framat í politikki og ikki krevja lóggávu á hesum øki!”*

Maður, aldur ?, miðnámsskúla

# Samandráttur

Kanningin staðfestir, at ein meiriluti av føroyingum eru ímóti at lóggeva um javnstøðu. Hetta síggja vit bæði í mun til tann kvantitativa og kvalitativa partin av kanningini.

Somuleiðis vísir kanningin á, at føroyskir menn ikki meta, at javnstøða millum kvinnur og menn er ein trupulleiki í Føroyum. Hendan hugburðin síggja vit eisini í tí kvalitativa partinum av kanningini. Kvinnur, hinvegin, halda at lønarmunurin hjá kvinnum og monnum og vantandi umboðan í nevndum í vinnulívinum eru millum størstu javnstøðutrupulleikarnar.

Fólk eru samd um, at tað er ikki ein stórvegis javnstøðutrupulleiki, at menn ikki verða útbúnir eins nógv og kvinnur. Hesin hugburður eigur at vekja ans í føroyska samfelagnum sum heild. Formaliserað vitan, útbúgving og førleikar eru avgerðandi fyri, hvussu vit sum einstaklingar og samfeløg klára okkum í einum globaliseraðum heimi. Vit vita, at ungar kvinnur taka miðnámsútbúgvingar í størri mun enn menn og nógvar kvinnur fara av landinum at nema sær víðari útbúgving. Á sama hátt vita vit, at tað eru færri kvinnur enn menn í Føroyum. Henda støðan kann gerast ein umvarðandi javnstøðu- og samfelagstrupulleiki fyri føroyska samfelagið. Eisini eru fólk samd um, at fáar kvinnufyrimyndir í frálærutilfari ikki er ein stórur trupulleiki. Hesin hugburður kemst ivaleyst av, at evnið ikki er nógv umrøtt í gerandisdegnum og er eitt sindur óítøkiligt at skula fyrihalda seg til. Lýsa vit lønarmunin millum kvinnur og menn í mun til hvørja útbúgivng fólk hava, síggja vit, at fólk eru samd um, at hetta er millum 5 teir størstu trupulleikarnar. Hetta ger seg eisini galdandi í mun til støðuna, tá talan er um, at ov fáar menn eru í umsorganarstørvum.

Kanningin bendir á, at nakrir av teimum javnstøðuspurningunum, sum vanliga verða havdir á lofti í almenna rúminum (vantandi kvinnuumboðan í nevndum og ráðum, vantandi umboðan í politisku skipanini og lønarmunur), tá vit kjakast um javnstøður, fáa høga raðfesting millum teirra við hægru útbúgvingunum. Hesi sjónarmið síggja vit eisini hjá teimum við fólk- ella miðnámsskúla. Við tað, at tað eru nógvar kvinnur í hesum bólkinum (56%, talva 5) er ikki óhugsandi, at kvinnur toga úrslitini mótvegis hesum økjum. Hetta eru eisini tey økir, kvinnur draga fram (mynd 3). Hetta kundi verið eitt tekin um, at tað eru kvinnur og tey við hægru útbúgvingunum í mynda orðaskifti í almenna rúminum og tey øki, sum verða raðfest. Hinvegin, so bendir kanningin eisini á, at javnstøða millum kvinnur og menn ikki hevur størstu raðfesting hjá monnum. Hetta síggja vit bæði í mun til raðfesting hjá monnum (talva 2) og í mun til teirra við handverkara- ella yrkisútbúgving har ein meirilut av svargevarunum (72%) eru menn (sí mynd 9 og talvu 5). Kvalitativi parturin av kanningin bendir á, at menn hugsa nógv um vantandi páparættdini sum ein javnstøðutrupulleika.

# Ávísingar

Europa-Parlamentet/Nyheder.
http://www.europarl.europa.eu/news/da/headlines/content/20110520STO19890/html/MEP%C2%B4ere-%C3%B8nsker-flere-kvinder-i-bestyrelserne

Føroyska javnstøðulógina. *Javnstøðunevndin.*
http://www.logir.fo/foldb/llofo/1994/0000052.htm#partur5

Føroya Arbeiðsgevarafelag. www.industry.fo

Hagstova Føroya. www.hagstova.fo

Knudsen, Karin J.L. (2010). Í Rafsndóttir, G.L. *Kvinder og velfærd i Vestnorden*. TemaNord 2010:578. København: Nordisk Ministerråd, 13-37.
http://www.norden.org/da/publikationer/publikationer/2010-578

Knudsen, Karin J.L. (2009). Í Niskanen, Kirsti og Nyberg, Anita (red.). *Kön och makt i Norden. Del I Landsrapporter*. TemaNord 2009:569. Köpenhamn: Nordiska ministerrådet, 321-340.
http://www.norden.org/da/publikationer/publikationer/2009-569

Nærverkið. www.naerverk.fo

## Ískoyti I – Spurnablað 1

# Spurnablað um javnstøðu millum kvinnur og menn

Føroyska Javnstøðunevndin hevur heitt á Granskingardepilin fyri Samfelagsmenning um at skipa fyri einari kanning millum fólk í Føroyum. Kanningin skal geva eina heildarmynd av, hvørjar áskoðanir kvinnur og menn í Føroyum hava um javnstøðu, og hvørji viðurskifti tey meta hava týdning í javnstøðuspurningum. Tískil heita vit á teg um at svara hesum spurnablaði.

Kanningin er anonym, og tað er sjálvboðið at taka lut í kanningini. Tað einstaka spurnablaðið verður ikki sjónligt í endaligu lýsingini av kanningarúrslitinum. Í slíkum kanningum er tað heildin, sum er áhugaverd, og ikki tað einstaka spurnablaðið. Tá viðgerðin av spurnabløðunum er liðug, verða tey burturbeind. Hetta eisini fyri at tryggja svargevarunum anonymitet. Harumframt hava starvsfólk á Granskingardeplinum fyri Samfelagsmenning tagnarskyldu.

1. Kyn: □ Kvinna □ Maður | 2. Aldur: ________ ár

3. Hjúnastøða: □ Gift(ur)/Sambúgvandi □ Stakur/Støk
□ Einkja/Einkjumaður □ Fráskild(ur)

4. Hevur tú børn? Ja □ Nei □

4a. Um tú hevur børn, hvussu nógv av teimum búgva heima? ________

5. Bústaður: □ Norðoyggjar □ Streymoy annars □ Sandoy
□ Norður Eysturoy □ Suðurstreymur □ Suðuroy
□ Suður Eysturoy □ Vágar

6. Skúlagongd: □ 1.-7. flokk □ Handverkara- ella yrkisútbúgving
□ 8.-10. flokk □ 1-2 ár á hægri lærustovni (t.d. diplom)
□ Styttri útbúgving (1 ár) □ Styttri útbúgving á hægri lærustovni (t.d. bachelor)
□ Miðnámsskúla □ Longri útbúgving á hægri lærustovni (t.d. kandidat)

7. Hvussu nógv arbeiðir tú vanliga um vikuna?
□ Fulla tíð □ Niðursetta tíð
□ Hálva tíð □ Annað ________________________________

8. Nevn 3 ting, sum tú skilir við javnstøðu millum kvinnur og menn:

1. __________________________________________________
2. __________________________________________________
3. __________________________________________________

9. Tosar tú við onnur um javnstøðu millum kvinnur og menn í Føroyum? Ja □ Nei □

9a. Um ja, við hvønn/hvørji? ________________________________
________________________________
________________________________

9b. Um tú tosar við onnur um javnstøðu millum kvinnur og menn í Føroyum, nevn 3 ting, ið tit tosa um:

1. __________________________________________________
2. __________________________________________________
3. __________________________________________________

10. Eru viðurskifti í Føroyska samfelagnum, sum skulu broytast fyri at betra um javnstøðuna millum kvinnur og menn í Føroyum? Ja □ Nei □

10a. Um tú heldur, tað eru viðurskifti, sum skulu broytast, nevn 3:

1. __________________________________________________
2. __________________________________________________
3. __________________________________________________

| |
|---|
| 11. Heldur tú, at myndugleikarnir í Føroyum áttu at sett tiltøk í verk fyri at betra um javnstøðuna millum kvinnur og menn í Føroyum? Ja □ Nei□<br><br>11a. Um tú heldur, at myndugleikarnir í Føroyum áttu at sett tiltøk í verk, nevn 3 tiltøk:<br>1. ______<br>2. ______<br>3. ______ |
| 12. Heldur tú, at arbeiðspláss í Føroyum áttu at sett tiltøk í verk fyri at betra um javnstøðuna millum kvinnur og menn í Føroyum? Ja □ Nei □<br><br>12a. Um tú heldur, at arbeiðspláss í Føroyum áttu at sett tiltøk í verk, nevn 3 tiltøk:<br>1. ______<br>2. ______<br>3. ______ |
| 13. Heldur tú, at skúlar í Føroyum áttu at sett tiltøk í verk fyri at betra um javnstøðuna millum kvinnur og menn í Føroyum? Ja□ Nei □<br><br>13a. Um tú heldur, at skúlar í Føroyum áttu at sett tiltøk í verk, nevn 3 tiltøk:<br>1. ______<br>2. ______<br>3. ______ |
| 14. Heldur tú, at tað er javnstøða millum kvinnur og menn í Føroyum? Ja □ Nei □ |

# Orðið er frítt

Onnur viðurskifti, ið tú metir hava týdning í mun til javnstøðu millum kvinnur og menn og javnstøðuspurningar sum heild, kanst tú skriva her:

______________________________

______________________________

______________________________

______________________________

______________________________

______________________________

______________________________

______________________________

# Ískoyti II – Spurnablað 2

Javnstøðunevndin

## Spurnablað um javnstøðu millum kvinnur og menn

Føroyska Javnstøðunevndin hevur heitt á Granskingardepilin fyri Samfelagsmenning um at skipa fyri einari kanning millum fólk í Føroyum. Kanningin skal geva eina heildarmynd av, hvørjar áskoðanir kvinnur og menn í Føroyum hava um javnstøðu, og hvørji viðurskifti tey meta hava týdning í javnstøðuspurningum. Tískil heita vit á teg um at svara hesum spurnablaði.

Kanningin er anonym, og tað er sjálvboðið at taka lut í kanningini. Tað einstaka spurnablaðið verður ikki sjónligt í endaligu lýsingini av kanningarúrslitinum. Í slíkum kanningum er tað heildin, sum er áhugaverd, og ikki tað einstaka spurnablaðið. Tá viðgerðin av spurnabløðunum er liðug, verða tey burturbeind. Hetta eisini fyri at tryggja svargevarunum anonymitet. Harumframt hava starvsfólk á Granskingardeplinum fyri Samfelagsmenning tagnarskyldu.

**1. Kyn:** ☐1 Kvinna ☐2 Maður | **2. Aldur:** ________ ár

**3. Hjúnastøða:** ☐1 Gift(ur)/Sambúgvandi ☐3 Stakur/Støk
☐2 Einkja/Einkjumaður ☐4 Fráskild(ur)

**4. Hevur tú børn?** ☐1 Ja ☐2 Nei

**4a. Um tú hevur børn, hvussu nógv teirra búgva heima?** ________

**5. Bústaður:** ☐1 Norðuroyggjar ☐4 Suðurstreymoy ☐7 Sandoy
☐2 Norðureysturoy ☐5 Streymoy annars ☐8 Suðuroy
☐3 Suðureysturoy ☐6 Vágar

**6. Skúlagongd** (*tú kanst seta fleiri krossar*):
☐1 Fólkaskúla 7 ár ☐4 Handverkara- ella yrkisútbúgving
☐2 Fólkaskúla 9/10 ár ☐5 Millumlanga, hægri útbúgving (3 ár)
☐3 Miðnámsskúla ☐6 Longri, hægri lærustovni (5 ár ella longri)

**7. Hvørji viðurskifti, nevnd niðanfyri, metir tú vera millum størstu javnstøðutrupulleikarnar, vit hava í Føroyum í dag?** (*set í mesta lagi 5 krossar*)
☐1 At ov fáar kvinnur eru í nevndum og ovastu leiðslu í vinnulívinum
☐2 At ov fáar kvinnur eru í nevndum, ráðum og ovastu leiðslu í almenna sektorinum
☐3 At ov fáar kvinnur eru umboðaðar í politikki
☐4 At ov fáir menn eru í almennum umsorganarstørvum (pedagogar, sjúkrarøktarfrøðingar, v.m.)
☐5 At stórur munur er á inntøkunum hjá kvinnum og monnum
☐6 At ov fáir pápar taka barnsburðarfarloyvi ella taka minna partin av barnsburðarfarloyvinum
☐7 At mammur taka størsta partin av barnsburðarfarloyvinum
☐8 At menn verða verri útbúnir enn kvinnur
☐9 At ov fáar kvinnufyrimyndir eru í frálærutilfari til undirvísing og uppaling
☐10 At kvinnur hava høvuðsábyrgd av heiminum
☐11 At kvinnur fáa minni útgoldið í uppspardari pensjón enn menn
☐12 Javnstøða millum kvinnur og menn er eingin trupulleiki í Føroyum

**8. Heldur tú, at myndugleikarnir í Føroyum eiga at:**

a. Lóggeva um at oyramerkja ein størri part av barnsburðarfarloyvinum til pápar? ☐1 Ja ☐2 Nei

b. Lóggeva um javnari býti av kvinnum og monnum í nevndum í vinnulívinum? ☐1 Ja ☐2 Nei

c. Lóggeva um javnari býti av kvinnum og monnum í Løgtinginum og í bý- og bygdarráðum? ☐1 Ja ☐2 Nei

**9. Tosar tú við onnur um javnstøðu millum kvinnur og menn í Føroyum?** ☐ Ja ☐ Nei

**9a. Um ja, við hvønn/hvørji?** (*tú kanst seta fleiri krossar*)

☐ Barn/Børnini ☐ Familju ☐ Maka ☐ Starvsfelagar ☐ Vinfólk

**10. Heldur tú, at myndugleikarnir í Føroyum áttu at sett ítøkilig tiltøk í verk fyri at betra um javnstøðuna millum kvinnur og menn í Føroyum?** ☐ Ja ☐ Nei

**11. Heldur tú, at arbeiðspláss í Føroyum áttu at sett ítøkilig tiltøk í verk fyri at betra um javnstøðuna millum kvinnur og menn í Føroyum?** ☐ Ja ☐ Nei

**12. Heldur tú, at skúlar í Føroyum áttu at sett ítøkilig tiltøk í verk fyri at betra um javnstøðuna millum kvinnur og menn í Føroyum?** ☐ Ja ☐ Nei

## *Orðið er frítt*

Onnur viðurskifti, ið tú metir hava týdning í mun til javnstøðu millum kvinnur og menn og javnstøðuspurningar sum heild, kanst tú skriva her:

FØROYAPRENT | SVANEMERKTUR PRENTLUTUR 541705

Javnstøðunevndin
Postboks 366
110 Tórshavn
Tlf.: +298 21 28 48
Heimasíða: www.javnratt.fo
T-postur: javnstoda@javnstoda.fo